# Býráðsfundur 21.03.2024

**Býráðsfundur 21.03.2024 kl. 18.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | Avboð |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**Mál til viðgerðar:**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 26/2024 – Eykaarbeiðið – Alis- og evnafrøðistovan | ALMENT |
| Mál nr. 27/2024 – Umsókn um byggiloyvi – Ólavur Johannesen | ALMENT |
| Mál nr. 28/2024 – Umsókn um byggiloyvi – Høgni Mikkelsen | ALMENT |
| Mál nr. 29/2024 – Umsókn um byggiloyvi – Guðrun Højgaard og Kartin Smith Jensen | ALMENT |
| Mál nr. 30/2024 – Umsókn um byggiloyvi – KBH | ALMENT |
| Mál nr. 31/2024 – Umsókn um byggiloyvi – Rúni Samuelsen | ALMENT |
| Mál nr. 32/2024 – Umsókn um uppískoytisstykki – Heri Hansen | ALMENT |
| Mál nr. 33/2024 – Umsókn um byggiloyvi – Katrin og Trygvi Kristiansen | ALMENT |
| Mál nr. 34/2024 – Eykajáttan til Roðan | ALMENT |
| Mál nr. 35/2024 – Ársroknskapur 2023 – Roðin | ALMENT |
| Mál nr. 36/2024 – Uppskot um broyting í viðtøkunum – Kommunufelagið | ALMENT |

**Mál nr. 26/2024 – Eykaarbeiðið – Alis- og evnafrøðistovan ALMENT**

J. nr.: 1901-1-2023

Í samband við umvælingina av alis- og evnafrøðistovuni verður mett, at gólvið ikki er nøktandi. Gólvið er illa farið og óslætt, og tað kann verða trupult hjá næmingunum at brúka stólar sum rulla, á einum gólvi, ið er skeivt.

Ástaðarfundur hevur verið um málið. Tekniski leiðarin og umboð frá Teknistovuni í Gøtu mæla til at umvæla gólvið. Síðani er tilboð komið frá KBH uppá eykaarbeiðið.

**Á fundi, tann 14.03.2024, mælir Tekniska nevnd til at umvæla gólvið og at taka av tilboðnum uppá eykaarbeiðið frá KBH.**

# Býráðsfundur 21.03.2024

**Á fundi, tann 19.03.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd og at fíggingin verður tikin av stovninum "Nýggi skúli – íløga".**

**Timælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 27/2024 – Umsókn um byggiloyvi – Ólavur Johannesen ALMENT**

J. nr.: 1201-8-2024

Í teldubrævi, dagfest tann 27.02.2024, søkir Ólavur Johannesen um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 474t á Lýðarsvegi 35. Ætlanin er at byggja bilhúsið áfast í húsini sunnanfyri. Bilhúsið er 45,5 fermetrar.

Bilhúsið, ið søkt verður um, stendur í beinleiðis forleinging av sethúsinum (ájavnt útvegg niðan móti vegnum).

**Á fundi, tann 14.03.2024, mælir meirilutin í Teknisku nevnd, Elin á Torkilsheyggi og Dakko Petersen, til annaðhvørt at loyva einum carporti á 2,49m frá marki ella bygging av garagu 4,08m frá marki við at loyva fráviki á 92cm. Minnilutin, Jan Højgaard, mælir frá at loyva fráviki.**

**Meirilutin, Súni í Hjøllum, Heini S. Kristiansen, Høgni Hansen, Dakko Petersen og Rannvá í Túni Petersen, samtykti tilmælið frá meirilutanum í Teknisku nevnd. Jan Højgaard atkvøddi ikki.**

**Mál nr. 28/2024 – Umsókn um byggiloyvi – Høgni Mikkelsen ALMENT**

J. nr.: 1201-7-2024

Í teldubrævi, dagfest tann 12.02.2024, søkir Halcon vegna Høgna Mikkelsen um byggiloyvi til sethús á matr nr 474n á Lýðarsvegi 28.

Talan er um sethús omanfyri vegin í eini hædd við lofti.

Húsini eru 140m², afturat tí kemur eitt loft á 70m².
Byggistigið er 0,2 og nýtslustigið er 0,3, sum er í tráð við ásetingarnar í byggisamtyktini.

**Á fundi, tann 14.03.2024, mælir Tekniska nevnd til at loyva byggiloyvi sambært viðlagdu tekningum.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 21.03.2024

**Mál nr. 29/2024 – Umsókn um byggiloyvi – Guðrun Højgaard og Kartin Smith Jensen ALMENT**
J. nr.: 1205-14-2022

Í teldubrævi, dagfest tann 06.03.2024, søkja Guðrun Højgaard og Kartin Smith Jensen um byggiloyvi til sethús á matr nr 665o á Ólavsvegi.

Talan er um sethús niðanfyri veg í tveimum hæddum, har ovara hæddin er inn frá vegnum. Harumframt er tilhoyrandi bilhús staðsett inn frá vegnum í norðara horni á húsunum.

Byggistigið og nýtslustigið eru innan fyri ásetingina í byggisamtyktini.

Tekniski leiðarin metur, at eingi frávik eru í umsóknini um byggiloyvi. Ávís viðurskifti, so sum brunaviðurskifti vm. skulu nágreinast betri í umsóknartilfarinum, áðrenn endaligt byggiloyvi verður givið – tískil, biður tekniski leiðarin um, at tekniska deild fær heimild at avgreiða vantandi ivamálini saman við umsøkjaranum, og síðan útskriva byggiloyvið.

**Á fundi, tann 14.03.2024, mælir Tekniska nevnd til at loyva byggiloyvið treytað av, at tilfarið verður nágreinað í samráð við tekniska leiðaran.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 21.03.2024

**Mál nr. 30/2024 – Umsókn um byggiloyvi – KBH** **ALMENT**
J. nr.: 1201-3-2021

Í teldubrævi, dagfest tann 26.01.2024, søkir KBH um byggiloyvi til tvey sethús á matr. nr. 109d og 109e, Agnið 15 og 17.

Bæði á Agninum 15 og á Agninum 17 er talan um sethús omanfyri veg í tveimum hæddum. Tilhoyrandi bilhús er áfast omanfyri húsini í sunnara horninum niðaneftir. Húsini eru á lendishædd 148m² íroknað bilhús, og 112 fermetrar á loftshæddini, tilsamans 260m² brutto.

Søkt verður um frávik frá ásetingunum í almennu byggisamtyktini kap. IV, gr. 4, stk. 9, ið ásetur at bygging skal í minsta lagi verða 2,5m frá grannamarki.
Tekniski leiðarin metir, at heimild er at geva undantak í hesum føri, grundað á, hvussu staðsetingin av sethúsunum og bilhúsinum, á hvørjum stykki sær, ikki skapa mistrivnað ella órógva á annan hátt granna-ognina, og heldur ikki økja um vandan fyri eldsbruna.

Ávísingarnar frá tekniska leiðaranum annars í samband við brunaviðurskiftini skulu verða galdandi.

**Á fundi, tann 14.03.2024, mælir Tekniska nevnd til at loyva byggiloyvi sambært viðløgdu tekningum og ásetingum frá tekniska leiðaranum.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 31/2024 – Umsókn um byggiloyvi – Rúni Samuelsen** **ALMENT**
J. nr.: 1201-9-2024

Í teldubrævi, dagfest tann 04.03.2024, søkir Rúni Samuelsen um byggiloyvi til uppíbygging til oljufýring. Talan er um uppíbygging norðanfyri sethúsini á 3 fermetrar.

Bygningurin stendur 0,74 m frá marki, brunakrøvini eru uppfylt og grannasáttmáli fyriliggur.

**Á fundi, tann 14.03.2024, mælir Tekniska nevnd til at loyva byggiloyvi sambært viðløgdu tekningum.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 21.03.2024

**Mál nr. 32/2024 – Umsókn um uppískoytisstykki – Heri Hansen ALMENT**
J. nr.: 1201-8-2023

Ein byggifrøðingur hevur, vegna Beintu og Hera Hansen, søkt um byggiloyvi til tvíhús á Lýðarsvegi 50 matr. nr. 474b.

Umsóknin kemur ov nær grannaognini bæði norðan- og sunnanfyri, og tískil hevur verið trupult at funnið eina loysn til, hvussu fyrispurningurin kann gangast umsøkjarunum á møti.

Heri Hansen og tekniski leiðarin hava avtalað, at fyri at kunna ganga umsóknini á møti, uttan stórvegis broytingar í sjálvum bygninginum, ið søkt verður um loyvi at byggja – so kann hann fáa játtað ískoytisstykki norðeftir við einum geira á 1,5m soleiðis, at húsini kunnu flytast heilt norður móti norðara marki.
Hesin leistur passar væl, tí í samband við komandi leingingina av Lýðarsvegi, so fer kommunan at gera vendiplássið, sum er beint norðanfyri matr. 474b, størri, og tískil kemur annar bygningur ikki á hetta stað.

Tískil mælir tekniski leiðarin til, at umsøkjarin fær loyvi at ogna sær ein geira, ið er 1,5 m breiður, afturat verandi grundstykkið norðeftir. Sostatt verður kravið um, at bygningurin skal verða 2,5m frá grannamarki sunnanfyri, uppfylt.

**Á fundi, tann 14.03.2024, mælir Tekniska nevnd til at loyva keyp av uppískoytisstykki.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Høgni Hansen varð úti undir viðgerðini.**

**Mál nr. 33/2024 – Umsókn um byggiloyvi – Katrin og Trygvi Kristiansen ALMENT**
J. nr.: 1201-15-2023

Í umsókn, dagfest tann 08.03.2024, søkir byggifrøðingur vegna Katrin og Trúgva Kristiansen um byggiloyvi til sethús á Høganesvegi 87, matr nr. 267k.

Húsini eru niðanfyri vegin í tveimum hæddum við tilhoyrandi bilhúsi. Ovarahæddin er ájøvn við vegin. Húsini eru 174,4 m2, tá bilhúsið er íroknað.

**Á fundi, tann 14.03.2024, mælir Tekniska nevnd til at loyva byggiloyvi sambært viðløgdu tekningum.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 21.03.2024

**Mál nr. 34/2024 – Eykajáttan til Roðan** **ALMENT**

J. nr.: 1105-6-2023

Tá fíggjarætlanin 2024 fyri Roðan varð løgd, var hon bygd á fyribils tøl út frá fólkatalinum (67+) pr. 01.09.2023. Býtið var tá til góð 21% til Nes kommunu, sum svaraði til kr. 20.055.515.
Nú eru tølini pr. 01.01.2024 klár og býtið er broytt, so at Nes kommunu skal fíggja 22%, sum svarar til kr. 20.511.322.

Hetta hevur við sær eina meirfígging á kr. 455.817.

**Á fundi, tann 19.03.2024, mælir Fíggjarnevndin til at játta meirfíggingina á kr. 455.817. Fíggingin verður tikin av tøkum peningi.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 35/2024 – Ársroknskapur 2023 – Roðin** **ALMENT**

J. nr.: 1105-7-2021

Ársroknskapurin 2023 hjá Roðanum er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

**Rakstrarroknskapur**

| | **Ár 2023 kr.** | **Ár 2022 kr.** |
|---|---|---|
| Kostnaður | | |
| Lønir v.m. | 81.350.082 | 74.881.227 |
| Keyp av vørum og tænastum | 13.523.705 | 12.087.481 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 74.221 | 503.123 |
| Leiga og viðlíkahald og skattur | 1.101.036 | 1.910.443 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 262.833 | 237.817 |
| Tilskot til einstaklingar | 691.352 | 707.312 |
| Kravd gjøld, bøtur o.a. | 0 | 200 |
| flyting til landið (komm) | 418.641 | 390.152 |
| Keyps-mvg | 780.443 | 815.939 |
| **Kostnaður íalt** | **98.202.313** | **91.533.694** |
| Aðrar inntøkur | -8.849.565 | -7.839.743 |
| Flytingar | -3.883.949 | -2.702.077 |
| **Nettokostnaður** | **85.468.799** | **80.991.874** |

| | | |
|---|---|---|
| **Fígging av nettokostnaðinum** | | |
| Leypandi inngjøld frá luttakandi kommunum, rakstur | 85.480.330 | 81.354.223 |
| Skuld til kommunurnar - ov nógv goldið í árinum | -11.531 | -362.349 |
| | **85.468.799** | **80.991.874** |

**Løguroknskapur fyri 2023**

| | **Ár 2023 kr.** | **Ár 2022 kr.** |
|---|---|---|
| **Kostnaður - bygningar** | | |
| Bygging og løguframleiðslu (bygningur) | 165.746 | 3.121.816 |
| Keyps-mvg | 10.360 | 194.160 |
| | **176.106** | **3.315.976** |
| **Fígging av nettokostnaðinum** | | |
| Leypandi inngjøld frá luttakandi kommunum, løgur bygningur | 0 | 1.712.056 |
| Áogn hjá til kommunurnar - ov lítið goldið í árinum | 176.106 | 1.603.920 |
| | **176.106** | **3.315.976** |

**Fíggjarstøða**

| | **Ár 2023 kr.** | **Ár 2022 kr.** |
|---|---|---|
| Goymslur og áogn íalt | -477.364 | 244.026 |
| Virðisbrøv og tøkur peningur | 709.216 | 461.921 |
| **Ogn íalt** | **231.852** | **705.947** |
| Útjavningarkonta | 0 | 0 |
| Stuttfreistað skuld íalt | 231.852 | 705.947 |
| **Útjavningarkonta og skuld íalt** | **231.852** | **705.947** |

**Á fundi, tann 19.03.2024, mælir Fíggjarnevndin til at góðkenna roknskapin hjá Roðanum, so sum hann er uppsettur.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 36/2024 – Uppskot um broyting í viðtøkunum – Kommunufelagið ALMENT**
J. nr.: 1101-25-2024

Arbeitt hevur verið við at broyta viðtøkurnar í Kommunufelagnum. Hetta kemur serliga at ávirka luttøku og atkvøðugreiðslu á borgarstjórafundum, starvsbólkafundum og aðalfundinum.

Kommununar verða bidnar um at koma við møguligum viðmerkingum áðrenn 02.04.2024. Uppskotið verður síðani lagt fyri aðalfundin 19.04.2024.

Uppskotið er viðlagt sum fylgiskjal til fundin.

**Á fundi, tann 19.03.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við uppskotinum um skipan av Kommunufelagnum.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**